# Bókablaðið



Føroysk bókaútgáva:

## Kappingaravlagandi bókastuðul

**Orðadrátturin var í løtum rættiliga hvassur við pallborðið á árliga bókadegnum í Norðurlandahúsinum herfyri, tá kjakast var um umstøðurnar, sum føroysk bókaforløg virka undir**


BÓKAKJAK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*


Hóast fólk tóktust vera á einum máli um, at korini hjá føroyskari bókaútgávu ofta eru ósømiliga trong, varð ongin niðurstøða gjørd á bókadegnum um, hvussu útgávuvirksemi best verður skipað í framtíðini. Fyribils kunnu vit bara staðfesta, at almenni stuðulin, sum verður latin er sera ójavnt býttur, og at tað eru fagurfrøðuligu bókmentirnar, sum eru við skerdan lut.

### Løgtingssamtykt lógarbrot

Á pallborðsfundinum legði Zakarias Wang hart út við at staðfesta, at verandi stuðul til føroysk bókaforløg er ímyndin av ongum minni enn einum lógarbroti, samtykt av Føroya Løgtingi. Ójavnt býtti stuðulin er ikki bara kappingaravlagandi, men beinleiðis í stríð við aðalreglur í kappingarlógini, sambært Zakarias.

- Sum er, hava privatu forløgini ongan tryggjaðan rætt til part av almenna stuðlinum, men kunnu bert vóna, at teirra biddargongd til vinnulív og onnur gevur úrslit, segði Zakarias, sum í hesum viðfangi tók hattin av fyri fólkum sum Justinus Eidesgaard, sum eisini sat við pallborði

Justinus minti tó á, at hann sjálvur var forleggjari av tvang heldur enn av huga. Eisini viðgekk hann bersøgin, at hansara forlagi neyvan hevði verið lív lagað, var tað ikki fyri góðu undirtøkuna hansara bøkur hava fingið í vinnulívinum.

- Eg vildi ynskt, at eg slapp at savna meg um at vera søgumaður heldur enn sølumaður. Sum støðan er nú, slepst ikki undan, at eg verði noyddur at hugsa líka nógv um, hvussu væl bókin fer at selja sum um dygdina, tá eg seti meg við skrivaraborðið, segði Justinus, sum annars skeyt upp, at rithøvundar verða tryggaðir okkurt slag av minstuløn, so teir fingu arbeiðsfrið.

### Skeivt brúktur peningur

Helena Dam á Neystabø á Føroya Skúlabókagrunni var tó ikki samd í, at tað eru alment stuðlaðu forløgini, sum avlaga kappingina á bókamarknaðinum. Hon vísti á, at Skúlabókagrunnurin als ongan áhuga hevur í at ota seg inn á onnur bókaøki og enn minni í at hava monopol innan skúlabókaútgávur. Heldur enn at illneitast inn á hvønn annan og vilja hava pengarnar hjá hvørjum øðrum áttu forløgini í felag at arbeitt fyri at fáa økt játtanina til bókaútgáva sum heild, helt hon.

Frá áhoyaranum varð gjørt vart við, at partur av peninginum, sum verður játtaður, ikki kemur bókaútgávu til góðar í nóg stóran mun. Her varð serliga skotið eftir Mentanargrunni Landsins, sum sambært stjóranum á Føroya Prent, brúkar alsamt minni pening til bókaútgáva, hóast játtanin til grunnin er hækkað. Rói Patursson, formaður í Mentanargrunninum, gjørdi vart við, at tað ikki ber til at leggja tølini soleiðis fram, við tað at tey ikki leggja upp fyri teimum starvslønunum, sum grunnurin letur rithøvundum á hvørjum ári. Í hesum partinum av kjakinum tóktist annars breið semja vera um, at best hevði verið við einum grunni, sum burturav tók sær av at fíggja bókaútgávur.




*Justinus Eidesgaard skjeyt upp, at rithøvundum verður tryggjað eitt slag av minstuløn, so teir um ikki annað fingu arbeiðsfrið. – Almenni kappingaravlagandi stuðulin til føroyska bókaútgávu minnir mest um eitt lógarbrot, samtykt av Føroya Løgtingi, helt Zakarias Wang*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Hálvlidnar skaldsøgur

Afturvendandi spurningurin um vantandi viðgerð og ráðgeving av fagurfrøðiligum handritum varð enn einaferð havdur á lofti við pallborðið. Stjórin á Bókasøluni vísti á, at enn er tað onki forlag, sum hevur orku til burturav at taka sær av at ritstjórna fagrar bókmentir við tí úrsliti, at tað ár eftir ár liggja fleiri skaldsøgur í bókahandlinum, sum ikki kunnu metast at vera meir enn hálvlidnar.

Spurningurin um, hvørt meir ráðgeving og pengar høvdu tryggjað eina betri góðsku á serliga fagurbókmentunum, varð tó ikki viðgjørdur nærri við pallborðið. Ivaleyst er hetta eisini ein spurningur, sum bókafólk hava rættiliga ymiskar sannføringar um yvirhøvur.

## Misjøvn dygd er nátúrlig




*- Jú fleiri útgávur, jú misjavnari verður dygdin. Tað sigur seg sjálvt. Men tað økir eisini um møguleikan fyri, at tær veruliga góðu bøkurnar eisini síggja dagsins ljos, heldur Jógvan Isaksen, ritstjóri*

**- Misjavna dygdin er ikki eitt sereyðkenni fyri føroyskar bókaútgávur. Heldur er hon ein treyt, um vit vilja hava ein fjøltáttaðan bókamarknað, sigur Jógvan Isaksen, ritstjóri á Mentanargrunni Studentafelagsins**


BÓKAKJAK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*


Jógvan Isaksen trýr ikki uppá, at meir ráðgeving og pengar kunnu tryggja eitt hægri støði á føroyskum bókaútgávum. Tað, sum vit fyrst og fremst hava brúk fyri, er eitt veruligt kjak millum bókafólk um, hvussu útgávuvirksemi í Føroyum yvirhøvur skal skipast framyvir, heldur hann.

### Fyrsta bókin skal til

Sjálvur heldur Jógvan, at vit eiga at tryggja okkum, at so nógv og so ymisk forløg, sum til ber, fáa møguleika at geva sínar bøkur út.

- Tað inniber nátúrliga, at dygdin verður misjøvn, men við nøgdunum av útgávunum økist eisini møguleikin fyri, at tær góðu verða fleiri og ikki minst, at tú kanst halda eitt vakið eyga við potentiellum góðum høvundum.

Vandin fyri, at ein avmarkandi og stýrandi útgávupolitikkur ger av við hesar møguleikar, er alt ov stórur, heldur Jógvan. Tí mælir hann eisini harðliga frá at fara víðari við tankanum um at skipa eitt stórt alment forlag - eitt uppskot, sum meir enn eina ferð hevur verið frammi í kjakinum um føroyska bókaútgávu. Hansara royndir sum ritstjóri í út við 30 ár hava lært hann, at tað ofta skal ein bók til, áðrenn ein góður rithøvundur veruliga fær luft undir veingirnar.

- Tað vísir seg javnan, at bara tað at fáa eina bók útgivna gevur høvundanum neyðuga sjálvsálitið og orkuna til at fara víðari og gera tað betri næstu ferð. So ger tað minni, at dygdin á fyrstu bókini kanska var ivasom, um hon letur upp fyri víðari menning.

### Ávarar

Mentanargrunnur Studentafelagsins hevur í ár givið 10 fagurfrøðiligar bøkur út. Samanumtikið er Jógvan nøgdur við útgávurnar, hóast hann ásannar, at onkur kundi verið meir heilskapað. Øll handritini hava tó fingið drúgva viðgerð og ráðgeving frá forlagnum, og uttan iva hevur tað ofta bøtt um og verið ein hjálp hjá høvundunum, heldur Jógvan. Hinvegin er tað ein spurningur, hvussu nógva meining tað gevur at halda á at ráðgeva, um høvundurin ikki hevur tað í sær, sum skal til.

- Stjórin á rithøvundaskúlanum, Poul Borum, plagdi at siga, at hann ætlaði sær ikki at læra nakran at gerast rithøvund, tí tað er nakað, tú ert frammanundan. Spurningurin er, hvussu tú fært tað fram, sigur Jógvan, og vísir á, at aftur her tykjast so nógvar og so fjølbroyttar útgávur at vera gongda leiðin.

Jógan ásannar, at forløgini áttu at fingið so mikið av peningi at arbeitt við, at tey fáa arbeiðsfrið og eitt slag av undirskotstrygd. Men so heldur ikki meira. Tað kann vera freistandi at draga stórar almennar upphæddir inn í bókaútgávu, men vit mugu ikki gloyma, at tað tá oftast eisini fylgja politisk áhugamál við. Og tá eru veruliga vandi á ferð fyri eini einsháttan av skaparanhuginum, sum ongin kann vera áhugaður í, ávarar Jógvan.